Russiskur fiskifrøðingur

Toskastovnurin í Barentshavinum hevur tað gott

Ein russiskur fiskifrøðingur loypti hvøkk á luttakarnar á ICES-fundinum sum var í Oslo í farnu viku. Hann segði at toskastovnurin longu komandi ár hevur ein gýtingastovn uppá meir enn 600.000 tons

Hava russarar rætt, so sær gott út hjá føroysku langfaratrolarunum

FISKISKAPUR
Jógvan Hugo Gardar, Oslo

Russiski fiskifrøðingurin Vladimir Borisov fekk starvsfelagarnar í altjóða havgranskingarráðnum (ICES) til at hvøkka við. Hansara boðskapur til starvsfelagarnar, sum vóru á fundi í Oslo, var at toskurin í Barentshavinum longu komandi ár aftur er burðardyggur.

Teir norsku fiskifrøðingarnir sum hoyrdu Borisov tóku hann als ikki í álvara. Teir mettu at tað hann segði var meir politikkur enn granskingarúrslit. Hetta skrivar IntraFish.

Óansæð hvat norsku serfrøðingarnir halda, so hevur ICES umhugsað at senda brev til russisku myndugleikarnar fyri at finna útav hvar Borisov hevur síni tøl frá. Vladimir Borisov arbeiðir á Fiskivinnu- og havgranskingardeplinum í Moskva.

Sambært Borisov er hitin í sjónum, nógv æti og annað sum ger at russar meta at stovnurin er komin fyri seg aftur.

Útspælið frá Vladimir Borisov gevur ábendingar um hvørja støðu russar vilja hava tá teir seinni í hesum mánaðinum skulu hitta norskar myndugleikar fyri at fastseta tí samlaðu toskakvotuna fyri Barentshavið komandi ár.

Um Borisov fær rætt og vinnur fram við síni hugsan, ja so kunnu føroyingar rokna við eini hægri kvotu komandi ár.

Laaaannngt vikuskifti í Keypmannahavn

hósdag til mánadag...ja!

1.995,- *)

Galdandi til 28. oktober

Undirhald, søga og hugni. Keypmannahavn hevur alt. Unna tær sjálvum eina friloytu frá gerandisdegnum. Eitt vikuskifti, har tú tekur tær av loitum. Spáka tær ein túr á Stroynum, keyp inn, stuttleika tær í Tivoli, ella fáa tær ein góðan bita í Nýhavnini. Alt ber til í deiligu Keypmannahavn.

Tú fert úr Vágum hóskveld kl. 20.40. Tú fært sostatt arbeitt allan hósdagin, og tú hevur allan friggjadagin í Keypmannahavn.

Atlantic Airways hevur nú hesar eykatúrar:

Til Keypmannahavnar:	hóskveld	20.40
Til Føroya:	friggjadag	08.55
Til Keypmannahavnar:	sunnukveld	17.30
Til Føroya:	mánadag	07.45

*) Ferðaavgjald sum er kr.365,- kemur afturat prísinum

ATLANTIC AIRWAYS

Bilegg hjá tínari ferðaskrivstovu ella hjá Atlantic Airways

Flogvallurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo

www.atlantic.fo

Nýtt sambýli í Norðragøtu

ELDRAØKI
Stefan í Skorini

Gøtu bygdaráð samtykti á fundi mánakvøldið at byggja eitt sambýli til eldri fólk í Norðragøtu.

Einki sambýli er í bygdini frammanundan, og tí er hetta ein slóbrótandi ætlan. Tað er eisini í tráð við, at landsstýrið leggur fleiri økir út til kommununar at umsita.

Enn er ætlanin ikki komin á tekniborðið, og tí er ógreitt, hvussu nógv tað fer at kosta skattaborgaranum, og hvussu nógv pláss vera á hesum sambýlinum hjá Gøtu kommunu.

Borgarstjórin í Gøtu, Haldóra Ranghamar, sigur at við at hava sítt egna sambýli í kommununi, sleppa tey frá at senda tey gomlu av bygdini á røktarheim.

20 nýggj grundstykki á Skála

ÚTSTYKKING
Stefan í Skorini

Skála bygdaráð hevur gjørt av at fara undir eina útstykking miðskeiðis í bygdini. Talan er um 20 grundstykkir, sum verða tøk hjá borgarum at seta búgv á.

Bygdaráðið hevur játtað 1,3 milliónir krónur til hesa ætlanina, og tað er ein stórur partur av íløgukarminum, sum landsstýrið ásetir. Íløgukarmurin hjá Skála er 2 milliónir krónur, so ikki er rúm til aðrar stórar íløgur hjá kommununi í hesum íløgukarminum.

Bygdaráðið hevur eisini ætlanir um at fáa bryggjuna longda. Teir fyrstu tjúgu metrarnir eru longu gjørdir, men óvist er, nær restin av hesum arbeiðnum verður gjørt.

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá kæri bróðir okkara

Jóan Petur Davidsen
Skála

brádliga varð tikin frá okkum.

Tøkk til prest, kirkjutænarar, sangarar og berarar og til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara hvíldarstað.

Tøkk fyri blómur og kransar.

Vegna tey avvarðandi
Sára, Maria og Dagmar

Allar bygdir skulu nú hava gøtunøvn og húsanummur

– Nú skulu allar bygdir í Føroyum hava gøtunøvn og húsanummur. Endamálið er, at tað skal vera lætt og einfalt hjá øllum at finna

SKRÁSETING
Áki Bertholdsen

Nú skal tað verða lættari hjá øllum at finna í Føroyum.

Tí skal hvør einasta gøta í landinum nú hava navn og hvørt einasta hús, hvør einasti bygningur, hvørt grundstykki hava húsanummar.

Tað ætlar landsstýrismaðurin í Vinnumálum, Bjarni Djurholm.

Hann hevur gjørt eitt uppskot til løgtingslóg um adressur, sum nú er sent kommununum tilummælis. Kommununar skulu hava svarað 25. oktober og ætlanin er at leggja uppskorið fyri Løgtingið longu í ár.

Eftir ætlanini eru tað kommunustýrini, sum skulu umsita adressuskipanina í hvørjari kommunu sær.

Hvør kommuna skal seta seta nøvn á vegir og gøtur og eitt nú á tún og býlingar.

Sostatt skal hvør bygd býtast sundur í hóskandi, avmarkað adressuøki og hvørt øki skal hava sítt serstaka navn.

Eitt adressuøkið er vanliga ein vegur, ella ein gøta, har hús eru. Men tað kann eisini verða ein býlingur, ella eitt natúrliga avmarkað øki.

– Tað, sum umræður, er, at uppbýtið er uppbýtið er lætt at fata hjá staðkendum eins og hjá fremmandum og er talan um eina lítla bygd, kann øll bygdin verða roknað sum eitt adressuøki, stendur í uppskotinum, sum Vinnumálastýrið hevur gjørt.

Men í hvørjum adressuøki skal hvørt hús, hvør bygningur og hvørt grundstykki hava eitt nummar.

Hetta skal gerast fyri hvørja bygd í eini kommunu.

Men fer eitt adressuøki um kommunumark, skal samráðast við grannakommununa um navnið.

Tað verða eisini kommunurnar, sum skulu betala skeltini, sum skulu setast upp.

Tá ið hetta er gjørt, skal ein landsadressuskrá setast á stovn. Hendan skráin er almenn og hon skal umfata allar adressur í landinum.

Hendan landsskráin fer at kosta 2,5 milliónir at gera. Men kommunurnar skulu betala fyri at fáa nøvn í skránni. Mett verður, at gjaldið frá kommununum fer at vera tvær milliónir.

Annars verður tað mett, at tað fer at kosta 100.000 krónur um árið at reka adressuskránna. Hetta gjaldið skal fáast til vega frá kommununum og teimum, sum ananrs brúka skránna

Neyðugt við greiðum viðurskiftum

Vinnumálastýrið sigur, at endamálið við lógini er at gera eina tíðarhóskandi adressuskrá, sum skal gera tað einfalt og lætt hjá einum og hvørjum at finna ávísan bústað, ella eitt ávíst stað í landinum

– Í sambandi við tilbúgving, neyðsynjarørindi og annars, tá ið ókunnug skulu finna í bygd og í bý, er tað neyðugt at hava eina eintýðuga staðfesting, sigur Vinnumálastýrið.

Og stýrið sigur, at hetta gerst best við adressum.

Tað skilst eisini, at ætlanin er, í hvussu so er seinni, at gera adressuskránna digitala og tá fer at bera til at knýta hana saman við GPS, so at stytsta og skjótasta leið til eina ávísa adressu verður uppgivin elektroniskt.

Vinnumálastýrið sigur, at tað hevur týdning bæði hjá einstaklingum, eins væl og hjá vinnulívi og stovnum, at ein nágreinilig adressuskrá er.

– Tað eru nógv dømi um, at tað er trupult hjá fólki at finna hús, fyritøkur ella stovnar. Fólk, fyritøkur og stovnar flyta ofta og bygdir og býir broytast alsamt.

–Fyri hin einstaka er tað í besta føri møtimikið, men tað kann eisini fáa álvarsligar avleiðingar um hetta t.d. forðar einum í at møta til eina starvssamrøðu.

– Tað eru eisini nógv dømi um, at virksemi hjá myndugleikum er tarnað, tí ongin fullfíggjað adressuskrá er. Eitt nu eru tele- og elverk, umframt flutningsfeløg javnan darvað av hesum, sigur Vinnumálastýrið.

Nu skal hvør bygd í Føroyum skipast í adressuøki. Eitt adressuøki er vanliga ein vegur ella ein gøta, men er talan um lítla bygd, kann øll bygdin vera eitt adressuøki. Men hvørt hús skal kortini hava eitt nummar, eisini í Dali, haðani hendan myndin er

Sálarlig kreppuhjálp viðurkend

Fólk, sum tørvar kreppuhjálp eftir onkra skakandi hending, hava nú møguleika fyri at fáa eitt alment ískoyti til sálarfrøðiliga viðgerð

SÁTTMÁLI
Turið Kjølbro

Týsdagin varð sáttmáli millum Meginfelag Sjúkrakassa Føroya og Føroyskar Sálarfrøðingar undirskrivaður. Sáttmálin ber í sær, at kommunulæknar kring landið kunnu vísa fólki til sálarfrøðiliga viðgerð, har sjúkrakassin rindar 40 prosent av kostnaðinum. Ískoytið verður latið til í mesta lagi 12 viðgerðir.

Sálarhjálp uttanfyri sjúkrahúsverkið hava fólk higartil sjálv verið noydd at rinda allan kostnaðin av. Nýggi sáttmálin fær gildi frá 1. november í ár og frá hesum degi hava vit eina skipaða almenna viðgerð fyri sálarkreppur, sum vit kenna hana aðrastaðni.

Tey, sum hava rætt til sálarhjálp, har sjúkrakassin rindar ein part, eru tey, sum tørvar kreppuhjálp eftir onkra skakandi hending í lívinum. Tað verið seg offur fyri ráni, harðskapi og neyðtøku, fólk, sum hava verið fyri ferðsluvanlukku ella aðrari vanlukku, fólk, sum eru avvarðandi til álvarsliga sálarliga sjúk fólk, fólk, sum eru rakt av álvarsligari avlemjandi sjúku, avvarðandi til fólk, sum eru rakt av álvarsligari avlemjandi sjúku, avvarðandi við andlát, her íroknað abort ella føðing av deyðum barni eftir 19. viku. Eisini kvinnur, sum hava fingið framt fosturtøku eftir 12. viku, av tí at barnið var vanskapt ella líknandi fáa kreppuhjálp. Kreppuhjálpin er eisini ætlað teimum, sum hava roynt sjálvmorð og ella eru sjálvmorðshótt.

Nýggi sáttmálin er avgjørt eitt framstig fyri føroyskar sálarfrøðingar.

- Vit síggja sáttmálan sum eina viðurkenning av tí sálarfrøðiliga viðgerðarháttinum. Hóast ymiskt er sum vit kundu hugsað okkum øðrvísi í sáttmálanum, er hetta ein byrjan, og fara vit framhaldandi at arbeiða við at betra um hann við Meginfelag Sjúkrakassa Føroya til frama fyri tey sum hava tørv á sálarfrøðiligari hjálp, siga Føroyskir Sálarfrøðingar.